# Stuðulsskipan

**Umhvørvis- og vinnumálaráðið**
**7. apríl 2020**

Stuðulsskipanin rindar ein part av føstu útreiðslunum hjá fyritøkum, sum hava mist ein stóran part av sínari inntøku.

TAKS fer at umsita skipanina, sum verður í gildi frá 1. apríl 2020 til og við 30. juni 2020.

## Hesar fyritøkur eru fevndar av skipanini

- Skipanin fevnir um allar fyritøkur, sum hava mist í minsta lagi 40 prosent av sínum umsetningi av teimum átøkum, ið eru framd fyri at tálma coronasmittuna.
- Skipanin fevnir ikki um tilfeingisvinnur og fiskavirking, landsstovnar, vinnuligar eindir hjá landinum ella kommunum o.l.
- Fyritøkur, sum klára seg sjálvar, fáa ongan stuðul.
- Serligar reglur verða fyri fyritøkur, ið eru stovnaðar eftir 1. januar 2019, og fyritøkur, sum ongan umsetning høvdu í tilvísingartíðskeiðum

## Krøv til umsóknir

- Søkjast skal um stuðul við støði í samlaðari meting av afturgongdini í umsetninginum hjá fyritøkuni. Einstaka fyritøkan skal sjálv gera umsetningin upp fyri tíðarskeiðið
- Metingin skal roknast í mun til umsetningin sama tíðarskeið í fjør, t.e. frá 1. apríl til 30. juni 2019.
- Gongst sum ætlað kann søkjast um stuðul síðst í apríl, tá ið stuðulsskipanin eftir ætlan er farin at virka. Umsóknir og skjalprógv skulu latast Vinnuglugganum hjá TAKS.

## Krøv til skjalprógv

- Skjalprógv fyri fastar útreiðslur skulu viðheftast, tá ið søkt verður um stuðul
- Tá ið tíðarskeiðið er runnið, skal fyritøkan boða frá veruligu føstu útreiðslunum í tíðarskeiðnum.
- Krøv verða sett um nøktandi skjalprógv, herundir grannskoðaraátekning v.m. Stuðulsumsitingin skal tryggja, at uppgerð av umsetningi og føstum útreiðslum er rættvísandi.
- Eru útreiðslurnar lægri ella hægri enn føstu útreiðslurnar, sum vóru nevndar í umsóknini, verður stuðulin tillagaður samsvarandi.

## Rindað verður fyri

- Skjalprógvaðar fastar útreiðslur, t.e. húsaleiga, el, hiti, fjarskifti, rentur, trygging o.l.
- Fyritøkur, ið hava mist millum 40 og 60 prosent av umsetninginum fáa 50 prosent endurrindað
- Fyritøkur, ið hava mist millum 60 og 100 prosent av umsetnginum fáa 75 prosent endurrindað
- Útgjaldið fyri hvørja fyritøku er í mesta lagi 80.000 kr. um mánaðin
- Fyritøkur, sum hava fleiri sjálvstøðug rakstrarstøð, fáa pengar til hvørt rakstrarstað, í mesta lagi 80.000 kr. um mánaðin
- Játtaður stuðul verður goldin skjótast tilber

## Treytir fyri at fáa stuðul

- Fyritøkurnar skulu ikki rinda út vinningsbýti fyri inntøkuárini 2020, 2021 og 2022
- Samsýning o.a. til stjóra og leiðslulimir skal ikki vera meira enn 600.000 kr. í 2020
- Fyritøka, sum fær endurgjald, rindar endurgjaldið aftur heilt ella partvís, um fyritøkan hevur yvirskot í roknskaparárinum 2020.

## Revsireglur

- Revsireglur verða gjørdar um sekt og endurrindan
- Tann, sum í umsóknini um endurgjald, letur villleiðandi upplýsingar ella dylur upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðina í málinum, kann TAKS taka avgerð um, at endurgjaldið skal rindast aftur
- Tann, sum í umsóknini um endurgjald, letur villleiðandi upplýsingar ella dylur upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðina í málinum, verður revsað/ur við sekt